## DAGSINS MEINING

# Á útlendskar hendur

Eitt nýtt tíðarrák eyðkennir støðuna í føroyska vinnulívinum. Hetta rák merkir, at stórar og týðandi føroyskar fyritøkur fara á útlendskar hendur. Hetta rák er vælkent uttanlands, har fyritøkur og virki støðugt skifta ánara. Seinastu árini hava eitt nú amerikanskar fyritøkur keypt upp stórar partar av danska vinnulívinum.

Eitt tílíkt rák er í sjálvum sær hvørki gott ella ringt. Kapitalurin hevur einki føðiland, segði gamli Marx, sum vit ikki hoyra so nógv til fyri tíðina. Hetta nýtist ikki at merkja, at hann er úti. Hann kemur heilt vist inn aftur á politiska leikpallin, áðrenn nakar varir. At kapitalurin einki føðiland hevur merkir sjalvsagt, at privatur íløgupeningur fer har, sum hann gevur mest av sær til eigaran. Her eru vit við nakað áhugavert og kanska við nakað, sum er sermerkt og øðrvísið við Føroyum. Føroyar eru helst eitt sindur øðrvísið við tað, at nógvar av teimum gomlu og sera vælkonsolideraðu fyritøkunum altíð hava sýnt eina serstaka ábyrgd mótvegis arbeiðsfólki, sjófólki og medarbeiðarum sum heild. Hetta hevur verið mestsum eitt serføroyskt fyribrigdi. Óneyðugt er at nevna nøvn í hesum sambandi. Sum dømi um hetta kunnu vit nevna, at vanligt var, at fólk, ið sum ung komu at starvast hjá hesum fyritøkum, ofta vóru verandi fyri alt arbeiðslívið.

Vit uppliva nú nakað annað. Stórar og vælskipaðar gamlar fyritøkur fara á útlendskar hendur. Hetta vil oftast siga tað sama sum íslendskar hendur. Vit uppliva sostatt, umframt mentanarimperialismu úr Danmark, eitt slag av friðaligari búskaparimperialismu úr útnorði. Hetta kunnu vit einki gera við. Okkum kann dáma hetta rák ella ikki dáma tað. Vit fáa einki gjørt við tað! Kapitalur, vørur og arbeiðsmegi hava nú frítt at fara um at kalla alt Europa og harvið eisini í útnorði. Spurningurin er bert, hvussu hetta rákið fer at ávirka samfelagið sum frálíður. Fer alt at vera sum fyrr? Fer hetta at gagna føroyskum vinnulívi ella fer hetta rák at drena føroyskt vinnulív fyri penng, orku, áræði og trivnað? Svarið blæsir í vindinum, og bert framtíðin kann geva svarið. Tó eru longu nú tekin í sól og mána til, at broytingar eru á veg og at brátt er einki, sum tað var, tá tær stóru og gomlu familjufyritøkurnar vóru á føroyskum hondum. Hvør, ið vinnur og hvør, ið tapir í hesi gongd, vil tíðin vísa.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Til Páll á Reynatúgvu og Høgna Hoydal

**Edvard Joensen**
*baðmaður á Sosialinum*



Kunnu Páll á Reynatúgvu og Høgni Hoydal, løgtingsmenn, vera so vinaligir at vísa á, nær og hvar Sosialurin hevur niðurgjørt ella skrivað negativt um húsini í Sandavági, sum keypt vórðu til sambýli fyri sinnisveik?

Hetta løgdu teir í orðaskifti á Løgtingi mikudagin 1. september 2004 Sosialin undir.

Sum blaðmaður á Sosialinum við redaktión í Vágum hevur undirritaði skrivað um húsini tann 23. januar 2003, stutt eftir, at tey vóru keypt, og aftur 1. juli 2004, tá starvsfólkini møttu til arbeiðis. Aftur var ein grein við frásøgn frá móttøku tann 27. august 2004.

Ongastaðni í greinunum dugi eg at síggja, at skrivað er nakað um, hvørt húsini eru egnað til ætlaða endamálið ella ikki. Av teirri einføldu orsøk, at tað meti eg meg ikki hava fakligan førleika til at døma um.

Kortini leggur Páll á Reynatúgvu í spurningi til landsstýrismannin undirritaða beinleiðis undir hetta, og Høgni Hoydal loypur sum kenda trøllið úr eskjuni upp á tingsins røðarapall og staðfestir pástandin hjá Pálli á Reynatúgvu.

Hinvegin er í Sosialinum víst á tann søgulig veruleika, at húsini stóðu tóm í umleið hálvtannað ár eftir at tey vórðu keypt. Fyrrverandi samgongan við tveimum landsstýrismonnum á økinum sýndi ikki nóg mikið av førleika til at taka húsini í nýtslu. Tað er staðfest. Eisini er staðfest, at tað gekk umleið eitt hálvt ár frá tí, at tveir landsstýrismenn vórðu skiftir út við ein, til lív kom í húsið.

Hvørjar negativu glósurnar um bygningin eru, sum Páll á Reynatúgvu í fyrispurningi sínum beinleiðis leggur undirritaða undir, fer hann væntandi at útgreina.

Sjálvur havi eg allar greinarnar, ið skrivaðar eru um málið, tøkar, og hóast eg havi lisið tær umaftur, finni eg ikki hatta, teir báðir tjóðveldistingmenninir tosa um.

Hóast tað er ikki sørt smikrandi at verða beinleiðis partur av fyrispurningi á Løgtingi, hevði tað verið stuttligari, um tað, sum sagt varð, var sannheit.

# Eitt hjartasuff

**Derick Herning**
*Lerwick*
*Shetland ZE1 0AN*

Í Hetlandi hava vit eina ta vakrastu sandstrondina í Skotlandi, - nevniliga St. Ninian´s Ayre. Henda strondin bindur saman oynna St. Ninian og høvuðsoynna "Mainland". Her bróta aldurnar frá Atlantshavinum upp á land frá báðum síðum, og stundum kunnu bylgjur norðanífrá og sunnanífrá koma saman mitt á strondini, tá ið illveður er. Fyri 25 árum síðani høvdu fólk enn loyvi at taka sand og grót haðani ið varð brúkt til húsabygging osf. Men so nógv tilfar varð tikið at enda, at tað kundi gera eitt varandi skarð á strondina. Myndugleikin í Hetlandi skilti, at nú var ein náttúruvakur staður í stórum vanda og so varð kunngjørt at tað var bannað í framtíðini at taka sand og grót.

### Hví skrivi eg um hetta?

Í Rituvík havi eg verið einar fimm ferðir, síðani eg kom fyrstu ferð til Føroya í 1973. Á sumri tá, var náttúran í og rundan um Rítuvík rík og blómandi. Sjógvurin kundi vera bláur, grønur, gyltur ella silvurlittur alt eftir tíðarskeiði og veðri. Á víkini fleyg sjófuglur í hundraðtali og lát og skríggj hansara hoyrdist frá morgni til myrkurs.

Nú er víkin næstan ljóðleys og sjógvurin hevur ein tungan gráan lit. Hvat er hent her? Eg havi hoyrt at skip regluliga koma til Rituvíkar fyri at pumpa sand og grót, ið skal brúkast til húsa-, vega- og kloakkbygging. Hetta virksemið verður framt, at síggja til, uttan loyvi ella umsjón. Hví kemur myndugleikin ikki upp í leikin? Hetta virksemið oyðileggur sjóvarumhvørvið í Rituvík: uttan sand gýtur smáfiskur ikki, seiður og nebbasild eru longu horvin, og sjófuglur finnur onga føði og fer av víkini. Soleiðis doyr umhvørvið.
Føroyingar eru í nógvum førum undan Hetlendingum, men viðvíkjandi náttúruvernd kunnu teir enn læra eitt sindur av okkum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


## VIÐMERKINGAR

# Folkets kirke er evangelisk forpligtet over for folket!

**Mogens Tilsted Christensen**
*Sognepræst*
*Præstegården FO-430 Hvalvík*
*Færøerne*



I debatten om spørgsmålet om, hvorvidt vielser skal ud af kirkerne er der følgende at bemærke:

Juridisk set er ægteskabet en borgerlig institution.

Men der er noget mere i ægteskabet. Det er her, kirken kommer ind i billedet.

Kirken er bygget på grundlag troen på Gud, der elskede verden så højt, at han sendte sin søn Jesus Kristus i menneskeskikkelse til denne jord (inkarnationen).

Den kristne kirke og altså også den danske folkekirke bør selvfølgelig vedblive at foretage vielser af mand og kvinde, idet vielsen er en guddommelig velsignelse af skaberværket vedrørende mand og kvinde, der skal være frugtsommelige.

Vielserne af mand-kvinde sammenføringerne skal kirken selvfølgelig gøre af de grunde, som den selv står for.

Kirkens grundlag er Gud. Og i skabelsesberetningen, som kan læses om i allerførste kapitel i bibelen ses, at Gud skabte mennesket i sit billede ˆ som mand og som kvinde skabte han dem for at de skulle være frugtsommelige (avle børn).

De to skal blive ét kød.

Derfor skal vielser af mand og kvinde selvfølgelig vedblive at være en kirkelig handling.

Men hvis verden og dens befolkning som sådan ønsker vielser af 2 af samme køn eller for den sags ønsker at føre folk eller noget sammen af andre perverse grunde og gøre deres samvær juridisk gyldige, så hører disse ganske enkelt ikke hjemme i kirken.

Selvfølgelig skal folkekirken ikke skilles ud fra staten på dette grundlag eller af andre grunde.

Den verdslige øvrighed kan ikke undvære kirken, og kirken kan heller ikke undvære den politiske verden, så længe den er folkets kirke.

Men at den er folkets kirke forhindrer ikke, at den skal forkynde evangeliet og handler derefter for folket.

# Tíðindaskriv frá Javni

Javni bjóðar limum sínum møguleikan fyri at fáa ráð-og vegleiðing frá sosialráðgeva

Javni, sum er felagið hjá fólki við menningartarni og familjum teirra, fer nú at bjóða limum sínum møguleika at tosa við sosialráðgeva.

Endamálið hjá Javna er at stuðla fólki við menningartarni og avvarðandi teirra og virka fyri áhugamálum teirra.

Tí hevur tað longi verið eitt ynski í Javna at kunna bjóða limum sínum hetta. Nú verður tað ein veruleiki. Vit vita ikki hvussu stórur tørvurin á hesi ráðgeving er, men ivast ikki í at tørvur er.

Frá 1. septembur kemur Karin á Heygum, sosialráðgevi, at arbeiða á skrivstovuni á Javna, har hon eisini nakrar tímar um vikuna kemur at virka sum sosialráðgevi hjá limumun í Javna.

Hevur tú brúk fyri hesum, er tú vælkomin at støkka inn á skrivstovuna á Hoydalsvegi 40 í Tórshavn.

Tú kanst ringja á telefon 314827, ella tú skrivar teldupost adressan er: javni@javni.fo

# Fólkaskúlin: Skal hann vera staðið, har dreymarnir bresta?

**Jón Ellendersen**



Tá eg læs námsfrøði á universitetinum á Amager, undraðist eg mangan á, at hvørja ferð vit tosaðu um elituskúlarnar í Fraklandi og Onglandi, kom øði í danir. Teir brúktu meiri tíð uppá at rakka elituskúlarnar niður, enn teir nýttu uppá at kanna tað, vit veruliga skuldu: Hvørja úrtøku høvdu næmingarnir á elituskúlunum í mun til vanliga danska fólkaskúlan. "Nej, i den danske skole er alle lige; ingen bliver fremhævet. De svage nyder godt af den synergi, som opstår i den danske folkeskole og de dygtige elever har kun godt af at lære at færdes i forskellige miljøer!"

Jú, gamaní. Men sig mær, eru dugnaligir næmingar eitt slag av børnum, sum liva sum holubúgvar ella eremittar, verða teir ikki frelstir av fólkaskúlanum? Eg minnist eisini tá eg gekk í Sankta Frants Skúla í Havn, ein privatur katólskur skúli, har flestallir næmingar lærdu meiri enn teir gjørdu í grannaskúlanum, Kommunuskúlanum. Hetta sást best tá vit komu í Hoydalar. Men, næmingarnir úr fleiri bygdaskúlum lógu á hædd við næmingarnar úr Nonnuskúlanum.

Hvat var munurin? Disciplin var eitt, at tiga í tímunum var eitt annað og vitanin um, at dugdi tú væl og var nærlagdur, bíðaði ein "gularót" í hinum endanum. Kommunuskúlabørnini vóru meiri áhugaði í at gera seg upp, fjasa, larma og brúka seg. Og tað sæst fyri stóran part aftur í samfelagnum í dag. Tey, við teimum bestu eksamiunum eru nærum altíð næmingar úr Nonnuskúlanum ella einum bygdaskúla. Súrt kanska, serliga fyri teir næmingar, sum hava brúkt so nógv ár í einum skúla, sum bert hevur lært tey 2/3 av tí, næmingarnir úr Nonnu- og bygdaskúlunum hava lært.

Nú eru sjálvandi undantøk, góðir næmingar úr Kommunuskúlanum og vánaligir úr Nonnu- og bygdaskúlunum, og soleiðis er tað altíð. Tað eru eisini vánaligir næmingar í elituskúlunum.

Men tá samanlíknast skal, so hava alt ov mong hug at javnmeta ensku og fronsku elituskúlarnar við japonsku skúlarnar, og á tann hátt rættvísgera tey tað, vit sóu í sendingini týskvøldið um tveir danskar skúlaflokkar. Men hetta er ein fullkomiliga vónleys samanbering. Ensku og fronsku skúlarnir hava einki at gera við teir japonsku, líka so lítið sum teir donsku hava at gera við elituskúlarnar í Onglandi og Fraklandi.

Úrslitið síggja vit! Alkoholiseraðar tannáringar, stórsøla av narkotiskum evnum í fólkaskúlanum, børn, sum einki annað vita sær til undirhald enn telduna og videospælaran. Tey eta skeivt, sova tilvildarliga, eru ofta deprimeraði, sættast illa við foreldur og systkin og eru mangan sera einsamøll. Fleiri teirra hava bert tjattarar á alnótini sum "vinir" - tey hava mist sambandið við veruleikan, og tá tey koma í skúlan, duga tey ikki at tilpassa seg, tí skúlin er fullur av livandi, nærverandi børnum.

Hetta er ikki bert galdandi fyri teir vánaligu næmingarnar, nei, teir góðu eru væl við. Vit hava fingið tað, sum annar lærarin í sendingini segði: Øll eru vorðin líka býtt! Eingin hevur notið ágóðan av hesum hasarderaða, politiska vágaverki - hvørki næmingar ella lærarar.

Og tíanverri er tað sama við at henda í føroysku skúlunum. Fyrr vóru tað teir donsku skúlarnir, sum skoraðu botnplossini í kanningunum, men nú eru teir føroysku væl á veg. Skúlin er ikki longur fyri børnini. Skúlin hevur einki at geva teimum. Og lærararnir eru frustreraðir. Og fyri at leggja stein oman á byrði, krevja foreldur at skúlin skal uppala børnini. Hvat foreldrini so skulu, hava tey enn ikki greitt frá. Hvussu í Himmalsins navni vanta tey, at ein lærari skal uppala 30 næmingum, 2-6 tímar um vikuna. Nær skal hann so vera lærari.

Fá tað inn í heysin: Vit vera aldri líka, enn minni eins av at skúlin verður gjørdur til eitt slag av búrhøsnaframleiðara. Teir góðu næmingarnir eru góðir av mongum orsøkum, teir vánaligu eru vánaligir av líka mongum orsøkum - og í miðjuni liggja teir næmingar, sum bøta mest av øllum, tí teir detta fullkomiliga niður í millum.

Tá sjálvur Sosialurin, talirørið fyri "at øll skulu vera so líka so líka" er farin at tala at, tá er helst uppá tíðina, at vit vakna. Ella skulu vit ikki longur hava føroyskar læknar, verkfrøðingar, økonomar og hinumegin, føroyskar skiparar, bilsmiðir og timburmenn? Skulu vit bara hava ein gráan hóp av ungdómi, sum ongan møguleika hevur at klára seg í universitetunum ella á teimum teknisku og maritimu útbúgvingunum? Skulu vit hava ein gráan hóp, sum livir av Valium og válar inn og út á psykiatriskum deildum tí tey hava mist sín virðismikla identitet?

Eg veit ikki, men kanska vit bara skulu bíða til vit hava oyðilagt framtíðina hjá fleiri hundrað næmingum avtrat og prógva, at "survival of the fittest" hóast alt ikki var nøkur høpisleys teori. Skulu vit vera leverandørar av 5% av yvirlivarum, 30% av teimum, ið klára seg so dánt og 65% av taparum, sum ongantíð upplivdu, at dreymarnir gjørdust veruleiki tí teir brustu í skúlanum?

Fara politikararnir og "øll-skulu-vera-líka-lærararnir" at kappast um at taka ábyrgdina tá sáið, teir sáa í dag er følnað og kvalt av ókrúti? Og skulu skúlarnir at enda vera ein leikvøllur hjá einum frustreraðum hópi av lærarum, sum hava gloymt hví teir lósu til lærara og næmingum, sum ikki longur vita, at í skúlanum kanst tú búnast til framtíðina?

Tað verður helst, sum abbi mín plagdi at siga: "Ganga í skúla í hundrað ár og so koma heim við einum idiotsprógvi!"

W W W . S O S I A L U R I N . F O